# Nýtt heimlán lættir um hjá fólki

**Norðoya Sparikassi legði fyrrapartin í dag fram eitt nýtt konsept við lánum. Nýggi lánimøguleikin Heimlán hevur undirheitið "Eitt heim, eitt lán, eitt gjald". Yvir eitt 20 ára skeið er møguleiki at spara heilt upp í 70.000 kr.**

PENINGASTOVNAR
*Snorri Brend*




*Eyðfinn Reyðberg vónar at mong fara at taka av nýggja Heimláns-tilboðnum hjá bankanum*
*Mynd: Snorri Brend*

**Klaksvík:** - Við hesum nýggja lánimøguleikanum ynskja vit at geva kundum okkara ta bestu tænastuna.

- Hetta er ein enføld skipan, ein skillig skipan og ein góð skipan fyri teir gomlu kundarnar hjá okkum. Og hetta er so sanniliga eisini ein góð skipan fyri teir nýggju kundarnar, sum vit vænta at fáa, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

Í hesum nýggja lánimøguleikanum bjóðar sparikassin sær at umleggja lánini, soleiðis at kundin yvir eitt 20 ára skeið kann spara heilt upp í 70.000 kr. samanlagt.

Skuldi ein áður hava eitt lán uppá 1 mió. kr., so var 1. veðrættur 60 % av húsavirðinum og við eini rentu uppá 3,45, og við 2. veðrætti uppá restina við 5,45 %.

Nú kann sama lán figgjast í stigum, soleiðis at frá 0 til 80 % av húsavirðinum fara við eini rentu uppá 3,45, meðan restin fer við 5,45.

Á henda hátt verður bæði ta mánaðarliga gjaldið minni, eins og sum nevnt sparir nógvan pening í longdini.

Millum tey nógvu góðu tilboðini í nýggja møguleikanum er eisini gjørligt bert at rinda rentu ella als einki í ávíst tíðarskeið, og at kundin kann fáa skáar í afturgjaldingini, tá tørvur er á tí, t.d. við barnsburð, arbeiðsloysi ella annað.

- Vit ynskja við hesum at vera fleksiblir. Vit vita av royndum okkara í 86 ár, at tað sum er best fyri kundan, tað er eisini best fyri okkum í sparikassanum.

- Hetta nýggja Heimlánið verður tí gjørt, tí kundin hevur sett ynski fram um tað. Tí vænta vit, at tað fer at fáa sera góða undirtøku, sigur ein sera bjartskygdur Eyðfinn Reyðberg.

Komandi ár fer Norðoya Sparikassi eisini at lata upp eina deild í Havn. Og tí er ikki frítt, at væntað verður at bæði fólk í Klaksvík, Norðoyggjum, Havnini og aðrastaðni fara at gera brúk av hesum nýggja tilboðnum.

# Stórt ungdómstiltak á Hálsi



*Unga áhoyrarafjøldin dámdi sera væl danska bólkin C21, og serliga vóru tað genturnar, ið vóru hugtiknar av donsku tónleikarunum.*
*Mynd: Eyðun Müller Thomsen*

**Nærum 800 ungdómar leitaðu sær leygarkvøldið í høllina á Hálsi til tiltakið Náttin er Ung, sum margarinfabrikkin skipaði fyri saman við øðrum.**

UNGDÓMSLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan var um eitt sonevnt rúsfrítt tiltak, har eingin atgongd var fyri fullum ungdómum, og rúsdrekka var bannað í høllini. Skráin var fjølbroytt við bæði bólkum, einstaklingum og dansigentum.

**Bæði sera gott og stak vánaligt**

Tónleikabólkarnir, ið vóru á pallinum, vóru danski C21 og so teir báðir føroysku bólkarnir Skunk og The Story Ends. Eisini var amerikanski rapparin ALX á palli eins og nakrar dansigentur.

Í blaðnum í morgin fara vit at hava drúgva frásøgn frá tiltakinum, og har fara vit eisini at umrøða teir ymsu framførslurnar. Men uttan at avdúka ov nógv, kunnu vit longu her siga, at støði á framførslunum var ógvuliga ymiskt. Okkurt var óvæntað gott, meðan okkurt var serstakliga vánaligt.

Havnar Bio

kall Coca-Cola




I dine sko

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 05.12 | kl. 21.45 |
| Týsdag | 06.12 | kl. 21.45 |
| Mikudag | 07.12 | kl. 21.45 |
| Hósdag | 08.12 | kl. 21.45 |




Pedderson & Findus 3 - Nissemaskinen

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 05.12 | kl. 18.00 |
| Týsdag | 06.12 | kl. 18.00 |
| Mikudag | 07.12 | kl. 18.00 |
| Hósdag | 08.12 | kl. 18.00 |




Harry Potter og flammernes pokal

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 05.12 | kl. 18.30 |
| Týsdag | 06.12 | kl. 18.30 |
| Mikudag | 07.12 | kl. 18.30 |
| Hósdag | 08.12 | kl. 18.30 |




The longest Yard

| | | | |
|---|---|---|---|
| Manadag | 05.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 |
| Týsdag | 06.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 07.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 08.12 | kl. 19.45 | kl. 22.15 |

Seinasta sýning

KOMANDI FILMAR:

FRUMSÝNING

Just like Heaven

Fríggjadag 09.12

HEIMSFRUMSÝNING

King Kong

Mikudag 14.12 kl. 00.01 kl. 19.00 kl. 22.45

Forsølan er byrjað

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu